# Læknarnir rudda

**Læknar beina rusk burtur á Landssjúkrahúsinum, men hóast hetta er arbeiði, sum portørarnir í verkfalli plaga at gera, so ætlar Havnar Arbeiðsmannafelag einki at gera við tað**

VERKFALL
*Eyðun Klakstein*

Læknarnir á Landssjúkrahúsinum beina nú rusk burtur, tí portørarnir, sum plaga at taka sær av ruskinum, eru í verkfalli.

Men hóast hetta arbeiðið er umfatað av verkfallinum, ætlar Havnar Arbeiðsmannafelag einki at gera fyri at steðga læknunum í at gera hetta arbeiðið.

– Ruskið kann ikki liggja og sløðast, tí tað kann gerast beinleiðis vandamikið, so tað má onkursvegna fáast av vegnum. Vit fara ikki at berjast við læknar, sum hava hug at taka rusk upp, sigur Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.



*Læknar taka nú rusk upp á Landssjúkrahúsinum. Hetta er vanliga uppgávan hjá portørunum, men teir eru í verkfalli*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Fútarætturin uppí

Portørarnir á teimum trimum sjúkrahúsinum eru framvegis í verkfalli, og tað verður ikki roknað við, at nakað hendir í málinum, fyrr enn verkfallið kemur fyri í fútarættinum týsdagin.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum heldur upp á, at verkfallið er ólógligt, og fer tí at royna at steðga tí umvegis fútarættin.

Orsøkin til verkfallið er, at ein portørur á Landssjúkrahúsinum varð sagdur úr starvi. Hesa uppsøgn við Havnar Arbeiðsmannafelag ikki góðtaka, og tí hevur tað sent allar hinar portørarnar í landinum í verkfall.




# Til Klaksvíkar at vitja blóðgevarar

**– Tað er hugaligt at síggja, at tað eru lutvíst nógvir blóðgevarar í Klaksvík, sigur Thomas Oldrup, sum vitjar Klaksvíkar Blóðdonorlið**

BLÓÐ
*Eyðun Klakstein*



*Thomas Oldrup, sum stendur fyri blaðnum Donor Nyt, vitjar í hesum døgum Klaksvíkar Blóðdonorlið*

**Klaksvík:** Tað eru nógv fleiri blóðdonorar í Klaksvík enn í Danmark, og Blóðdonorliðið riggar væl.

Tað heldur Thomas Oldrup, sum starvast hjá blóðdonorunum í Danmark. Hann stendur fyri at gera blaðið Donor Nyt, sum eisini føroyskir blóðgevarar fáa.

– Í Danmark verður sagt, at okkurt um fimm prosent av fólkinum eru blóðgevar, men her eru lutvíst nógv fleiri, kanska ein 10 prosent av klaksvíkingum, og tað er sera gott, sigur hann.

### Skriva um Føroyar

Hóskvøldið var Thomas Oldrup við á hugnakvøldi hjá Klaksvíkar Blóðdonorliði, sum varð hildið í kantinuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Hann ætlar sær eisini at gera eitt sindur burtur úr ferðini hjá sær til Føroya í komandi blaðnum hjá blóðgevarunum.

### Fingið nýggja trygging

Blóðgevarnir hava eitt árligt hugnakvøld, tá okkurt serligt verður gjørt burtur úr, og hesaferð var Thomas Oldrup boðin við at greiða frá, hvussu skipanin við blóðdonor virkar í Danmark.

Harafturat greiddu umboð frá Tryggingarfelagnum Føroyar frá, hvussu nýggja tryggingin fyri blóðgevar virkar, og hvat hon umfatar. Hetta er ein nýggj trygging, sum blóðgevarar í Føroyum hava fingið.

### Gera burturúr

Endamálið við hugnakvøldinum hjá Klaksvíkar Blóðdonorliði er at gera okkurt serligt burturúr.

– Vanligt er, at donorarnir møta upp á sjúkrahúsinum, lata blóð og fara avstað aftur. Eina ferð um árið bjóða vit tó donorunum til eitt hugnakvøld, har vit gera eitt sindur burturúr, sigur Ólavur Samson, sum saman við Christiani Jørgensen og Karin Jacobsen er í nevndini fyri Blóðdonorliðið í Klaksvík.

Undirtøkan fyri kvøldinum er vanliga góð, og soleiðis var eisini hesaferð. Nógv fólk møttu til tiltakið, sum tey halda eydnaðist væl.



